Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Møguleikar hjá heilsurøktarum og námshjálparum at lesa víðari

Spurningar:

1. Hvat skal til fyri, at heilsurøktarar kunnu lesa víðari til sjúkrarøktarfrøðing og námshjálparar til námsfrøðing?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa fyri, at heilsurøktarar og námshjálparar kunnu fáa uppsamlingsskeið við tí, tey mangla, so tey kunna lesa víðari?
3. Hvat er kostnaðurin av hesum?

Viðmerkingar:
Nú starvsfólkatrotið er stórt á røktarøkinum og innan pedagogiska økið er neyðugt at tryggja, at tey, sum hava lisið til heislurøktara og námshjálpara, kunnu útbúgva seg víðari í Føroyum. Við eini smidligheit í útbúgvingarskipanini eigur hetta at bera til. Til dømis kundi man skipað fyri uppsamlingsskeiðum, har hesi fólkini kunnu fáa tær lærugreinar, sum tey mangla fyri at fara víðari. Sum skilst er ikki so nógv, sum manglar í.

Bæði sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingin og námsfrøðiútbúgvingin í Føroyum eru á hægri stigi enn í Danmark. Av tí, at man í Danmark enn hevur hesar útbúgvingar á professiónsbachelor støði, er møguleiki at lesa víðari har. Hetta kann gera, at fólk fara av landinum at lesa útbúgvingar, sum eru í Føroyum. Við at skipa fyri, at hesi fólkini kunnu fáa tær lærugreinar, sum tey mangla, verður skaptur møguleiki fyri, at tey kunnu lesa víðari í Føroyum. Tað hevði uttan iva verið ein góð íløga fyri okkum øll.

Á Løgtingi, 23. november 2021

Sirið Stenberg